# Reglugerð
# fyri
# Ung í MáF

1. Felagið er ungdómsfelagsskapur í MáF.

2. Navn felagsins er Ung í MáF.

3. Endamál felagsins er at styrkja og menna leiklistaráhugaðan ungdóm í Føroyum.

4. Felagið verður fíggjað við stuðuli frá MáF og øðrum. Stuðulin frá MáF verður veittur til hvørja verkætlan sær. Roknskapur/váttað yvirlit yvir inntøkur og útreiðslur skal latast MáF fyri allar verkætlanir, ið hava fingið stuðul.

5. Øll leiklistaráhugað millum 14 og 30 ár kunnu gerast limir.

6. Limagjaldið verður ásett á aðalfundinum eftir tilmæli frá nevndini.

7. I nevnd felagsins verða valdir 3 limir og 2 varalimir. Nevndarlimir og varanevndar-limir verða valdir á hvørjum ári. Nevndin skipar seg sjálv við formanni, skrivara og kassameistara.

8. Aðalfundurin er hægsti myndugleiki felagsins. Hann verður hildin í novembur mánaði á hvørjum ári, og verður lýstur í bløðunum og á heimasíðuni 14 dagar frammanundan. Atkvøðurætt hava allir limir, ið hava goldið limagjald fyri seinasta árið. Limur skal vera 18 og í mesta lagi 30 ár fyri at verða valdur í nevnd.

9. Á aðalfundinum verður til viðgerðar:
    a. Frágreiðing frá farna ári
    b. Roknskapurin
    c. Stjórn og varalimir verða valdir
    d. Limagjaldið verður ásett
    e. Ymiskt

10. Nevndin hevur ábyrgd av rakstri felagsins og til at útinna hetta.

11. Felagið hevur ábyrgd yvir fyri nevndini í MáF, og skulu øll tiltøk verða gjørd í samráð við dagliga leiðaran sum umboð fyri nevndina í MáF. Felagið letur MáF ársfrágreiðing og roknskap.

12. Hendan reglugerð kann ikki verða broytt uttan á vanligum aðalfundi.

13. Eykaaðalfundur kann verða hildin, tá ein fjórðingur av felagslimunum krevja tað skrivliga.

Soleiðis samtykt á aðalfundi tann .

(undirskrift nevndarlimanna)